# Ríkismyndugleikin ikki virt áheitanina

*Jenis av Rana hevur nú spurt Vibeke Larsen, ríkisumboð, hví ein kongilig fyriskipan viðvíkjandi hjúnabandslógini ikki enn er útint*

ÓLAVUR Í BEITI

Jenis av Rana, løgtingsmaður, hevur spurt Vibeke Larsen, ríkisumboð, um ríkisumboðið fær greitt Løgtinginum frá, hví ríkislógartilmæli samtykt av Løgtinginum 16. apríl 1999 og staðfest og kunngjørt ríkismyndugleikunum av løgmanni 23. apríl 1999 um at seta í gildi fyri Føroyar »lov om ægteskabs indgåelse og opløsning« ikki enn er útint við eini kgl. fyriskipan.

**Danir ábyrgdina**

Í viðmerkingunum til spurningin, sigur Jenis av Rana, at tá nevnda ríkislógartilmæli varð einmælt samtykt á Løgtingi, vóru nógv fólk væl nøgd, millum onnur tey, sum við hesum nú sóu ein møguleika fyri frameftir at hava vígslur í teimum føroysku fríkirkjunum Men nú er eitt gott ár farið síðan hesa løgtingssamtykt, uttan tó at ríkismyndugleikin hevur virt áheitan Løgtingsins.

– Undirritaði hevur sett munnligan fyrispurning til Høgni Hoydal, landsstýrismann, um m.a. hetta sama mál, men landsstýrismaðurin vísir til, at danskir myndugleikar hava ábyrgdina.

– Viðmerkjast skal, at tað er ikki bara henda løgtingssamtyktin, sum er samtykt, uttan at danskir myndugleikar hava gingið ynski Løgtingsins á møti, sigur Jenis av Rana í viðmerkingunum.



# VIT fyrst við wap-tænastu í Føroyum

*Sum tann fyrsta í landinum, bjóðar teldufyritøkan VIT nú viðskiftafólkum sínum at vitja heimasíðuna á fartelefonini*

WAP, sum er ein stytting fyri Wireless Application Protocol, er so smátt við at vinna frama í londunum kring okkum, og í Danmark hava wap heimasíður verið tøkar í nakrar mánaðir.

Eitt nú ber til at lesa styttar greinar hjá dagblaðnum Aktuelt á wap-fartelefonum, og Lån & Spar Bank bjóðar viðskiftafólkun**um at síggja konto**avrit, flyta pening millum egnar konti og annað á wap-fartelefonum.

**Donsku bankarnir** hava eisini ætlanir um at lata viðskiftafólkini gera vanligar flytingar á wap-fartelefonum um stutta tíð.

**Skeiðtilmeldingar**

Á wap-heimasíðuni hjá VIT fæst ein listi yvir tey skeið, sum VIT-stovan bjóðar, og gjørligt er eisini at tekna seg gjøgnum fartelefonina.

Wap-heimasíðan hjá VIT er at finna á adressuni http://wap.vit.fo

VIT, sum annars eisini er kent fyri at gera framkomnar heimasíður, fer í næstum at leggja seg eftir at gera fleiri wap-heimasíður fyri viðskiftafólk.

Sambært Reidar Ole-Jacobsen frá VIT, er tað í flestu førum bara talan um at umleggja verandi heimasíðu til wap-tøknina, men alt má gerast við skili, soleiðis at tað ikki gerst neyðugt við dupultum viðlíkahaldi.

**Wap-fartelefonir**

Um wap-fartelefonir kann sigast, at tær eru serligar við tað at rúturin á fartelefonini er nógv størri enn vanligt - og so hevur fartelefonin eina rulli-mús.

Allir teir størru framleiðararnir av fartelefonum gera eisini wap-fartelefonir, og í Føroyum fáast tær eitt nú hjá JS-Radio í Handilskjarnanum.

Haðani frættist, at nógvir føroyingar longu hava ognað sær eina slíka.

Við tí framgongd, sum bæði internetið og fartelefonirnar hava havt í Føroyum seinastu árini, kann roknast við, at wap — eins og í grannalondunum — fer at vaksa í stórum her heima í komandi tíðum.

# 50 fólk mjólka landskassanum í fullveldisarbeiði

*Stórur partur av hesum fólkum hava ikki arbeitt við fullveldisætlanini burturav, og tí kundi verið áhugavert at fingið at vita, um lønarútreiðslurnar hjá hesum fólkunum hava verið roknaðar sum útreiðsla í sambandi við fullveldismálið, vil Heðin Mortensen hava at vita*

ÓLAVUR Í BEITI

Heðin Mortensen hevur spurt sjálvstýrismálaráðharran Høgna Hoydal nakrar spurningar um starvsfólk til fullveldisætlanina. Heðin Mortensen spyr, hvussu nógv fólk eru - og hava verið í starvi hjá landsstýrinum í sambandi við fullveldisætlanina? Eru fólk sett í starv í Danmark fyri at gera PR-arbeiði fyri fullveldinum? Hvat er endamálið hjá landsstýrismanninum í sambandi við internet-herferðina? Kann landsstýrismaðurin upplýsa fyri tinginum, hvat fullveldisætlanin higartil hevur kostað, og hvussu nógv hon í framtíðini fer at kosta? Hevur landsstýrið ætlanir um at geva andsstøðuni sama møguleika, at kunna um alternativar møguleikar til fullveldisætlanina (her verður hugsað um tekniskar- og fíggjarligar møguleikar)? Og at enda spyr tingmaður Sambandsins, hvør skal hava atkvøðurætt á fólkaatkvøðuni um framtíðarstøðu Føroya?

**Hvítabók**

Í viðmerkingunum til spurningarnar, sigur Heðin Mortensen, at meðan nógv tiltrongd arbeiði her á landi liggja á láni, verður nógv arbeiðsorka løgd í fullveldisætlan landsstýrisins.

– Í innganginum til Hvítubók og í fylgibindunum verða yvir 30 navngivnir persónar nevndir, sum hava verið við í arbeiðinum í sambandi við útgávuna av Hvítubók, og harumframt verða 8 nøvn nevnd á útlendskum serfrøðingum, sum búskaparnevndin hevur ráðført seg við.

– Aftaná at Hvítabók var útkomin (og tvær ferðir umsett til danskt), kom eitt ískoyti til búskaparpartin, sum var gjørt á Háskóla Íslands. Hvussu nógv arbeiðsorka varð løgd í hetta verk, er ilt at siga, men tilfarið varð ikki almannakunngjørt fyrr enn 25. november við teirri grundgeving, at tað var ikki liðugt til útgávudagin av Hvítubók, sum var 1. september, sigur Heðin Mortensen.

**Caragata**

Og viðvíkjandi Caragata álitinum, sigur Heðin Mortensen, at tað er skrivað av trimum serfrøðingum, harav tveir koma úr New Zealandi, íme̊ðan tann triði arbeiðir í Texas. Hesir hava verið minst tvær ferðir í Føroyum í sambandi við arbeiðið at skriva og leggja fram Caragata álitið. Í fororðunum takka teir hjálparfólki úr Føroyum, Íslandi, New Zealandi, Bretlandi og úr USA fyri hjálpina, og teir nevna 48 navngivnar persónar.

– Grundlógarnevndin hevur higartil havt 11 fundir við allari nevndini, umframt uml. 25 bólkafundir í teimum 8 bólkunum, sum eru undir grundlógarnevndini. Harumframt koma fundirnir, sum hava verið millum formannin og skrivaran í nevndini, og eisini hevur verið skipað fyri evnisdegi í Norðurlandahúsinum fyri limirnar í grundlógarnevndini.

– Umframt hetta hevur verið skipað fyri ráðstevnu fyri smátjóðir við útlendskum fyrilestrahaldarum, og í morgunsendingini hjá útvarpinum var fyri stuttum tosað við mann, sum segði seg arbeiða á føroysku viðskiftastovuni í Keypmannahavn, har hann var »PR-maður hjá landsstýrinum«.

**Atkvøðurætt**

– Landsstýrið hevur verið í Danmark á samráðingaferð, har 17 fólk vóru við – umframt ein landsstýrismaður, sum ikki luttók í samráðingunum. Og nú fara trý landsstýrisfólk saman við embætisfólki niður at »kunna« Fólkatingið um fullveldismálið.

– Eisini kundi verið áhugavert at fingið at vita, um ráðstevnan um smátjóðir er íroknað prísin, sum fullveldisætlanin hevur kostað? Landsstýrismaðurin hevur fyrr sagt, at andstøðan eisini hevur fingið síni sjónarmið við á heimasíðu landsstýrisins um fullveldi. Men her er talan um sjónarmið, sum landsstýrið sjálvt hevur valt. Tí kundi verið áhugavert at fingið at vita, um andstøðan fer at fáa møguleika til sjálv at leggja síni sjónarmið út á hesa heimasíðu?

Eisini kundi verið áhugavert at fingið at vita, hví Caragata álitið og »íslendsku tølini« ikki verða nevnd á heimasíðuni um fullveldið. Annars tykist tað løgið, at nú, minni enn tríggjar mánaðir áðrenn samráðingarnar við donsku stjórnina skulu verða lidnar, veit landsstýrið framvegis ikki, hvør fer at hava atkvøðurætt til fólkaatkvøðuna, sigur Heðin Mortensen m.a. í viðmerkingunum til fyrispurningin.